# Blása lív aftur í skótarnar á Tvøroyri

**Nú er ætlanin at endurstovna skótarørsluna í gomlu skótabygdini. Í annaðkvøld er ætlanin at øll áhugað møta á Kunningarstovuni at leggja arbeiðið til rættis**

SKÓTALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tvøroyri er gomul skótabygd, men nú er nógv ár síðani, at skótarørslan datt niðurfyri.

Ymsar royndir eru gjørdar at endurstovna skótarørsluna, men tær eru dotnar niðurfyri, helst tí at av nógv arbeiðið hevur hingið á ov fáum herðum

Men stendur tað til nøkur hugagóð tvørafólk, verður skótarørslan á staðnum nú evnurstovnað.

Og fortreytirnar fyri tí eru avgjørt til staðar, tí skótahús er á Tvøroyri, sum skótarørslan á staðnum eigur. Tað hevur verið karmur um lívligt virksemi á Tvøroyri, men tað treingir bara til eina bøtandi hond fyri aftur at verða sera væl brúkiligt til endamálið.

Poula Strøm á Kunningarstovuni er ikki ein av teimum, sum fer at ganga á odda at endurreisa skótarørsluna á Tvøroyri, men tað verður kortini hon, sum kemur at samla træðrirnar, í hvussu so er til rættiligt gongd er komin á.

Fyrsta stigið verður at gera húsið ístand. Fólk hava longu verið og fingið tað ringast óruddið út, men so er eftir at gera ymsar ábøtur innan.

Poula Strøm heldur avgjørt, at tað kundi verið sera gagnligt at endurstovnað skótarørsluna á Tvøroyri.

– Tað eru nógv tilboð á Tvøroyri, men tað er kortini eitt stórt tómrúm, tí tey, sum ikki hava hug til ítrótt, detta mangan niðurímillum. Og tað er sjón fyri søgn, at tað er ein hópur av børnum og ungum, sum bara gongur og válar, uttan mál ella mið í frítíðini og hja teimum kundi hetta verið eitt sera gott og gagnligt tilboð, heldur hon.

Tað eru eisini ágrýtin ungfólk, sum eru huga at skipa fyri ymsum tiltøkum fyri børnum og ungum á Tvøroyri, táið skótahúsið er gjørt ístand.

– Skótahúsið kann gerast ein frálíkur karmur um alt møguligt virksemið, tí her eru nógvir møguleikar.

Alt hetta kostar pening, men tey siga, at tey hava fingið stuðul ymsastaðni frá, so tann partin síggja tey ljóst uppá.

Ætlanin er at savnast á Kunningarstovuni í annaðkvøld, hóskvøldið, klokkan 19, har ætlanin er at leggja arbeiðið til rættis. Øll, sum hava áhuga í at hjálpa til at endurreisa skótarørsluna á Tvøroyri eru vælkomin at møta. Tey, sum hava hug at vera við, men sum ikki fáa møtt, eru vælkomin at ringja á Kunningarstovuna at siga frá.

Ætlanin er so at býta fólkið sundur í nøkur lið við hvør sínari uppgávu og so er ætlanin at fara til verka beinanvegin.



# Hans Pauli Strøm fekk gult kort

**Landsstýrismálanevndin sigur, at Hans Pauli Strøm helt upplýsingum aftur, tá málið um miðnámsskúla í Hovi og røktarheim í Vági varð kannað**



*Hans Pauli Strøm fær átalu frá landsstýrismálanevvndini fyri at hava hildið upplýsingum aftur. Ì viðmerking aðrastaðni her á síðuni, sigur Hans Pauli Strøm, at nevndin hevur fingið allar upplýsingar í málinum*

EMBÆTISFØRSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hans Pauli Strøm hevur nú fingið tað gula kortið.

Og hevur hann fingið frá sjálvari Landsstýrismálanevndini hjá løgtinginum.

Landsstýrismálanevndin hevur kannað spurningin um at flyta ætlaða miðnámsskúlan til Hovs og at byggja røktarheim í Vági á stykkinum, sum varð ætlað til miðnámsskúlan.

Í sambandi við hesa kanning, er landsstýrismálanevndin so misnøgd við leiklutin hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni, at hon hevur sent honum eina átalau, ella kanska enntá eina ávaring.

– Skuldu vit brúkt ítróttarmál, kunnu vit siga, at landsstýrismaðurin hevur fingið gula kortið, sigur Kári P. Højgard, formaður í Landsstýrismálanevndini.

### Helt upplýsingum aftur

Nevndin er júst liðug at viðgera málið um miðnámsskúlan og røktarheimi.

Tað hevur annars gingið strilti hjá landsstýrismálanevndini at fáa øll skjøl í málinum.

Men, tað, sum ger nevndina serliga ónøgda, er, at Hans Pauli Strøm hevur ikki givið henni øll skjølini, sum hann hevur um málið Og tað metir nevndin at vera álvarsligt.

– Landstýrismálanevndin hevur staðfest, at tygum ikki hava latið nevndini øll viðkomandi skjøl í málinum, sigur nevndin í einum skrivi til Hans Paula Strøm.

Tað er eitt ávíst skriv, sum landsstýrismálanevndin hongir seg í og sum landsstýrissmaðurin í almanna- og heilsumálum ikki flýggjaði nevndini, hóast hon hevði biðið um øll skjøl í málinum.

Talan er um eitt skriv frá arkitektafelagnum hjá Árna Winther um, hvat tað fer at kosta at flyta miðnámskúlan til Hovs og at byggja ellisheim í Vági ístaðin.

Hetta er eitt skjal, sum Landsstýrismálanevndin hevði fingið skrivið frá Árna Winther frá mentamálaráðnum

– Tá ið landsstýrismálanevndin spurdi Hans Paula Strøm á fundi, um hann hevði flýggjað nevndini øll skjøl, játtaði hann hesum, sigur Kári P. Højgaard.

– Tá ið vit so løgdi skrivið frá Árna Winther fyri Landsstýrismannin, viðgekk hann, at hann hevði fingið tað á landsstýrisfundi, men at tað ikki var skrásett í málinum.

– Nevndin metir skjalið vera sera viðkomandi fyri viðgerðina av málinum og vísir á, at tygum hava hildið hesum aftur, eftir at nevndin bæði skrivliga og munnliga á fundi hevur spurt ítøkiliga um fleiri viðkomandi skjøl vóru og at tygum ikki viðgingu at kenna tað, fyrrenn tað var tygum greitt, at nevndin longi kendi til skjalið, skrivar Landsstýrismálanevndin í skrivi til Hans Paula Strøm.

Nevndin nýtir hetta høvi til at minna landsstýrismannin á, at skyldur hansara eftir lógini um ábyrgd landsstýrismanna. Har er ásett, at landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað, ella av grovum ósketni, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av einum máli.

Kári P. Højggard sigur, at skrivið er sent landsstýrismanninum fyri at gera greitt, hvussu ónøgd hon er við mannagongdina.

Kortini vil nevndin ikki koma til ta niðurstøðu, at talan er um beinleiðis lógarbrot og ger tískil ikki meiri við málið.

– Nú vit hava sent landsstýrismanninum skriv, har vit vísa okkara greiðu ónøgd, meta vit samstundis at málið er avgreitt, sigur Kári P. Højgaard.

Hans Pauli Strøm:

# Eg læt allar upplýsingar frá mær

**–Brævið, sum eg verði átalaður fyri at hava hildið aftur fyri Landsstýrismálanevndini, var als ikki stílað til mín, men til mentamálaráðið, sigur Hans Pauli Strøm**

EMBÆTISFØRSLA
*Áki Bertholdsen*

– Eg havi ikki hildið nøkrum sum helst upplýsingum aftur.

– Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna-og heilsumálum, sigur, at hann hevur givið landsstýrismálanevndin hvønn tár og ting av upplýsingum, hann hevur havt um miðnámsskúlan og røktarheimið í Suðuroy.

Hann sigur í stuttari viðmerking, at skjalið, sum hann verður átalaður fyri at hava hildið aftur fyri landsstýrismálanevndini, er eitt skjal, sum Arkitektafelagið hjá Árna Winther hevur skrivað um møguleikarnar og kostnaðin fyri at flyta miðnámsskúlan til Hovs og at byggja eitt røktarheim í Vági ístaðin.

– Men hetta er altso ikki eitt skjal, sum er sent Almanna- og heilsumálaráðnum. Hetta er tvørturímóti eitt skjal, sum varð stílað til mentamamálaráðið.

– Sostatt er tað heldur ikki skrásett í almanna- og heilsumálaráðnum, leggur hann afturat

Tí helt Hans Pauli Strøm, at tað var sjálvsagt, at Landsstýrismálanevndin fekk skrivið frá Mentamálaráðnum – og tað gjørdi nevndin eisini.

Hans Pauli Strøm sigur kortini, at hann fekk eitt tvítak av skrivinum.

– Aftaná skal eg tó geva teimum rætt í, at tað kundi kanska verðið lagt saman við upplýsingunum frá okkum til landsstýrismálanevndina.

Hans Pauli Strøm staðfestir sostatt, at hann hevur fingið átalu fyri ikki at hava útflýggjað eitt skjal, sum ikki var stílað til hansara, men til mentamálaráðið.

– So kann ein og hvør gera sínar metingar av støðuni, leggur hann afturat.

# Maðkurin kannaður í Kaldbak

Ì eini grein í Vikuskiftisblaðnum skrivaðu vit um ein løgnan maðk, sum dagrøktarbørn á Tvøroyri høvdu funnið. Vit skrivaðu at Nattúrugripasavnið hevði kannað maðkin og skrivað børnum eitt fitt bræv aftur, at tað varð greitt frá, at tslan var um ein sjáldsaman maðk, sum bara varð funnin fýra ferðir áður í Føroyum.

Ilt er at siga, hvussu slíkt mistak kundi henda, tí tað var ikki Náttúrugripasavnið, sum hevði kannað maðkin, men Havlívfrøðiliga Royndarstøðin í Kaldbak.